

*Oksavikurnar eru fyri framman*

MYND: ISTOCK

# Puha – 104 dagar til páskir

**JÓLINI** ERU FARIN FRAM VIÐ, OG **PÁSKIRNAR** ERU SEINAR Í ÁR. HETTA **MERKIR**, AT TAÐ ER **LANGT** TIL NÆSTU **FRÍTÍÐ**. HEILAR **104** DAGAR HAVA VIT **TALT** OKKUM TIL. **HER** ERU NØKUR **TIPP** UM, HVUSSU TÚ **KLÁRAR** HESA MYRKU OG **ARBEIÐSSOMU** TÍÐ



**VETUR**

**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

»Oksavikurnar« vóru komandi 15 vikurnar nevndar í gamla bóndasamfelagnum. Navnið komst av, at tað er ein strævin tíð, ið er fyri framman.

Men tíbetur eru vit komin nakað longri nú á døgum og kunnu unna okkum at taka okkum av lættum við jøvnum millumbilum.

Men at tað er ein myrk tíð slepst ikki undan. Tí er gott at fara út at ganga ein túr, meðan dagsljós er. Tá fær kroppurin týdningarmiklu D-vitaminirnar, og vit gerast glaðari av at røra okkum.

***Annað, sum tú kanst gera fyri at klára hesa tíð, er til dømis:***

- Lesa eina góða bók
- Fáa tær eitt fótabað
- Smílast meira
- Baka breyð

***Og um tú hevur ráð:***

- Far til frisør
- Keyp eina ljóslampu
- Byrja at venja á venjingarmiðstøð
- Ger negl á salong

***Og um tú er desperat:***

- Far ein túr suðureftir
- Far á skíðferiu

**KLUMMAN**



*Eydna Skaale*

# Hini, tey óndu, og vit, tey góðu

Í Føroyum er tryggingarprísurin so sera lágur, frætti eg ein dagin, tí her er óvanliga lítið av kriminaliteti. Fá innbrot, fá álop, fáir tjóvar, ja, vit eru sum heild friðalig, fryntlig og fitt.

Men uttanlands, uha, har er støðan ein heilt onnur. Uttanlands mást tú ansa tær, ikki líta á nakran og goyma alt virðismikið inni at kroppiskinninum, tí annars endar tað sum tjóvagóðs. Garanterað!

Tá eg sum yngri fór einsamøll at ferðast, var eg lívsforskrekt av øllum ræðusøgunum, eg fekk við mær úr Føroyum, um álopsmenn, neyðtøkumenn og tjóvar úti í heimi. Knúgvarnir vóru hvítir konstant, tí eg helt so fast um taskuna. Men eg møtti bara vinarligum fólkum.

Tá eg fyri trimum árum síðani flutti niður, teknaði eg mær innbúgvstrygging sum tað allarfyrsta, tí "í Danmark eru so nógv innbrot". Men enn er einki stolið frá mær har.

Og tað er annars ikki tann størsta avbjóðingin, skal eg heilsa og siga.

Bara í heyst havi eg t.d. mist pengamappuna (har ALT er í), fartelefonina og pengamappuna (har ALT framvegis er í). Men hvørjaferð, eg sjálv havi sløsað mær ting burtur á alfaravegi, hava erligar sálir tikið tað til forvaring og stríðst við at fáa mær tað aftur. Ikki ein króna hevur manglað í mappuni, og ikki ein króna av talutíð er brúkt.

Men: herfyri var mítt góða og kæra myndatól stolið. Tað var tó ikki rænt av barbarisku bakbeistunum úti í heimi. Nei - tað var stolið her. Í Havn. Tað var tikið frá mær, og eg havi nú mist alla vón um at fáa tað (og allar myndirnar) aftur.

Moralur? Ja, kanska tað fremmanda ikki er so vandamikið, sum vit ganga og halda. Og kanska vit als ikki eru so góð og meinaleys, sum vit billa okkum sjálvum inn.

Var tað ikki einaferð okkurt við eini flís í einum eyga?




## INNIHALD


2 KLUMMA: **HINI, TEY ÓNDU, OG VIT, TEY GÓÐU**
4 VANGAMYND: **ANNIKA OLSEN**
8 INTERVIEW: **LARS OHLY**
10 TIPS: **HVAT SIGA LITIRNIR UM TEG**
11 90 SEKUND: **THURID KJÆRBO**
12 BAKGRUND: **VEN VIÐ TØKNI**
14 TIL ARBEIÐIS: **JANA EJDESGAARD THOMSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 SØGULIG HENDING: **CHARLES LINDBERG Í FØROYUM**
22 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **FROST**


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Annika Olsen / Jens Kristian Vang